# Public service-sáttmáli millum Kringvarp Føroya og Almanna- og mentamálaráðið



Tíðarskeiðið: 1. juni 2024 til 31. mai 2028

KRINGVARP FØROYA

# Innihald


1. **Sáttmálin í stuttum** ...... s. 3

2. **Kringvarpið skal verja fólkaræði og mentan** ...... s. 4

3. **Kringvarpið skal skapa virði fyri øll fólk í Føroyum** ...... s. 5

4. **Lógarásettar public service-skyldur** ...... s. 6

   4.1 Krepputilbúgving

   4.2 Miðlasavnið

5. **Sáttmálaásettar public service-skyldur 2024–2028** ...... s. 7

   5.1 Lýsa og greina føroyska mentan í breiðastu merking

   5.2 Miðla aktuelt tilfar á høgum journalistfakligum stigi

   5.3 Førleikamenna starvsfólk

   5.4 Menna føroyska málið og samleika føroyinga

   5.5 Bjóða dygdargóðar talgildar tænastur

   5.6 Fevna breitt og víðka sjónarringin

   5.7 Eggja til javnstøðu millum kynini

   5.8 Eggja til fólkaræðisligt tilvit

   5.9 Viðgera viðurskifti í øllum Føroyum

   5.10 Samstarv um og keypa framleiðslur

   5.11 Miðla til undirvísing

   5.12 Miðla til fólk, ið bera brek

   5.13 Miðla til tilflytarar

6. **Fígging** ...... s. 10

   6.1 Kringvarpsgjald, kunngerðar- og sponsorinntøkur

   6.2 Støðlaðar spæliinntøkur

   6.3 Rakstrarkostnaður seinnu árini

7. **Ársfrágreiðing um virksemið** ...... s. 11

# 1. Sáttmálin í stuttum

Public service sipar til at vera í "fólksins tænastu." Endamálið við public service-sáttmálanum er sostatt at lýsa, hvussu Kringvarp Føroya tænir Føroya fólki. Sáttmálin lýsir virksemið hjá stovninum og tær kjarnuuppgávur, sum skulu loysast.

Í lógini um Kringvarp Føroya er heimilað landsstýrisfólkinum, eftir orðaskifti í løgtinginum, at undirskriva ein tíðaravmarkaðan public service-sáttmála við Kringvarp Føroya um at raðfesta og tryggja ávísar nærri allýstar public-service skyldur. Partarnir vóna, at hesin sáttmálin, sum er galdandi frá 2024 til og við 2028, kann virka fyri, at Kringvarp Føroya fær eitt gott grundarlag at røkja sínar public service-skyldur og fyri at virka í fólksins tænastu.

Virksemið hjá Kringvarpi Føroya verður sambært kringvarpslógini fíggjað við kringvarpsgjaldi, kunngerðarinntøkum, sponsorering og øðrum virksemi, sum er knýtt at uppgávum stovnsins. Allar raðfestingar og skyldur, sum eru nevndar í sáttmálanum, eru tongdar at einum nøktandi fíggjarligum grundarlagi.

Kringvarp Føroya hevur, sum sjálvstøðugur, almennur stovnur, týðandi public service-skyldur mótvegis Føroya fólki. Kringvarpið skal miðla og mynda føroyska mentan í breiðastu merking. Stovnurin hevur somuleiðis alstóran týdning fyri fólkaræðið í landinum, tí hann í virksemi sínum varpar ljós á og elvir til kjak um samfelagsviðurskifti. Kringvarp Føroya skal framleiða og senda dygdargott tilfar, sum fólkið kann kenna seg aftur í, og á henda hátt virka fyri, at øll fólk gerast betur før fyri at taka støðu til og ávirka samfelagsgongdina fólkaræðisliga. Hetta merkir, at stovnurin bindur seg til at tryggja eitt breitt útboð av sendingum og tænastum fyri alt Føroya fólk umvegis ymiskar pallar.

Kringvarpið fer í 2024 at leggja eina ætlan fyri allan stovnin, sum skal virka innan fyri karmarnar á hesum sáttmála, og har endamálið er at røkka 4 av 5 føroyingum hvønn dag. Harafturat eru fleiri ítøkiligir málsetningar fyri komandi sáttmálaskeið, sum verða nærri lýstir á næstu síðunum. Til dømis kunnu børnini gleða seg til fleiri barnasendingar á fleiri pallum. Stovnurin fremur serlig átøk á ungdómsøkinum fyri at fáa tey ungu at brúka føroyskt tilfar. Kringvarpið veksur um nøgdina av týddum og tekstaðum tilfari. Fleiri siðmennandi sendingar vera á skránni. Ein nýggj og tíðarhóskandi journalistisk stevna skal orðast, sum skal málrætta framleiðsluna og lyfta góðskuna uppaftur meir. Kringvarpið mennir talgildar pallar, soleiðis at tað verður ómakaleyst at njóta breiða útboðið av sendingum og tænastum, bæði nýtt og gamalt, sum eru fyri alt Føroya fólk.

Umframt skyldurnar at miðla aktuelt og mentanarligt miðlatilfar til Føroya fólk, hevur Kringvarpið eisini tvær kritiskar funktiónir fyri samfelagið, sum eisini eru ásettar í kringvarpslógini. Kringvarpið er tilbúgvingarstovnur og skal í sambandi við váðar og vandar vera til reiðar at varpa út boð í samstarvi við lands- og kommunutilbúgvingarnar. Kringvarpið umsitur eisini miðlasavnið, sum inniheldur alt miðlatilfar, sum er framleitt í Føroyum, síðan Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya byrjaðu at senda í ávikavist 1957 og 1984.

# 2. Kringvarpið skal verja fólkaræði og mentan

Høvuðsuppgávan hjá Kringvarpi Føroya er at verja føroyskt fólkaræði og føroyska mentan. Við hesum í huga seta nýggjar avbjóðingar dám á public service-sáttmálan, sum er tann triði millum Kringvarp Føroya og avvarðandi stjórnarráð, í hesum føri við Almanna- og mentamálaráðið. Lætta atgongdin og vaksandi nøgdin av tilfari á altjóða pallum hevur við sær, at fólk hyggja og lurta meira eftir útlendskum tilfari. Harða kappingin um miðlabrúkaran ger, at brúkarin nýtir minni tíð til føroyskt tilfar. Enska málið vinnur meira fram, og málførið – serliga hjá børnum og ungum – er undir trýsti.

Miðlalandslagið er nógv broytt, og miðlatilboðini eru øðrvísi í dag, enn tá undanfarnu sáttmálar komu í gildi. Privatu miðlarnir hava minni kreftir enn fyrr, og eitt vaksandi tal av brúkarum siga sosialar miðlar vera høvuðskelduna til sína tíðindanýtslu. Tilvísingarnar til føroyska mentan og samleika fækkast. Sum frá líður kann hetta elva til, at savningarmegin viknar, tí felagsskapurin millum fólk ikki er líka sterkur sum fyrr. Hetta kann, sum frá líður, ávirka samfelagsliga treystið og fólkaræðisliga tilvitið.

Alt hetta setur uppaftur størri krøv enn áður til leiklutin hjá Kringvarpi Føroya sum ein savnandi miðil í føroyska samfelagnum. Fremsta endamálið hjá Kringvarpi Føroya er at savna felagsskapin, at verja borgaran og at avdúka møguligar váðar og vandar, sum kunnu hótta mentanina, fólkaræðið og vælferðina í landinum.

Kringvarp Føroya kann tó ikki einsamalt verja fólkaræði og mentan. Kringvarpið er ein framleiðslustovnur og er ikki einsamallur førur fyri at menna miðlavanar, talgildar førleikar og keldukritiskar førleikar millum okkara fólk. Tí má politiska skipanin eisini undir eina tilgongd, har ymisk øki í samfelagnum, serliga útbúgvingarøkið, eisini gera sítt til at verja føroyska fólkaræðið og mentanina.

Kringvarp Føroya fer í sáttmálaskeiðnum at leggja stóran dent á tørvin á hesi verju og at tillaga virksemið soleiðis, at tað samsvarar við nýggjastu avbjóðingarnar. Fyri at leggja upp fyri ávirkanini uttaneftir, má ein nýggjur public service-sáttmáli seta munagóð átøk á breddan. Kringvarpið fer at leggja eina arbeiðsætlan í 2024, sum fer meira í smálutir við, hvussu málsetningarnir í public service-sáttmálanum kunnu røkkast.

# 3. Kringvarpið skal skapa virði fyri øll fólk í Føroyum

Visjónin hjá Kringvarpinum er at vera fremsti mentanarberi føroyinga. Øll fólk í Føroyum skulu fáa eitt virði burtur úr tilfarinum. Við hesum í huga fer Kringvarp Føroya tí undir at fremja eina miðvísa arbeiðsætlan fyri allan stovnin, sum skal virka innan fyri karmarnar í public service-sáttmálanum, og sum skal seta eina greiða kós fyri stovnin sum heild og allar deildirnar komandi árini. Strategiska málið hjá Kringvarpi Føroya verður, at 4 av 5 føroyingum brúka kringvarpspallarnar hvønn dag.

Nýtsla av kringvarpstilfari á sosialum miðlum er ikki íroknað í sambandi við henda málsetningin. Fyri at røkka málinum skulu týðandi átøk fremjast serliga á trimum økjum: (1) tøkniliga infrakervið skal styrkjast, (2) framleiðsluætlanir skulu tillagast fyri deildirnar Aktuelt og Mentan og (3) starvsfólka- og førleikaætlanir skulu setast í verk og skipast frameftir. Fyri at halda neyvt eyga við gongdini, fer stovnurin eisini at gera regluligar kanningar av nøgdsemi, áliti og nýtslu millum fólk í landinum. Nýggja arbeiðsætlanin – ella strategiin – fyri Kringvarp Føroya, sum nágreinar omanfyrinevnda, verður liðug í 2024.

# 4. Lógarásettar public service-skyldur

Public service-sáttmálin virkar innan fyri karmarnar á kringvarpslógini (Løgtingslóg nr. 61 frá 2006, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 163 frá 2015). Skyldurnar í lógini eru sjálvandi galdandi, so leingi lógin er galdandi. Sáttmálin leggur nakrar skyldur aftur at hesum lógarásettu skyldum, sum eru galdandi fyri sáttmálaskeiðið. Lógarásettu skyldurnar eru millum annað, at Kringvarp Føroya skal útvarpa tíðindi, upplýsing, mentan og undirhald og skal leggja dent á upplýsingar- og talufrælsi, sakliga og óhefta upplýsing og eitt fjøltáttað tilboð, sum varðveitir og fjálgar um mál, mentan, átrúnað og siðalæru føroyinga. Eisini skal Kringvarpið leggja dent á gott, føroyskt mál og skal tryggja starvsfókunum holla málsliga ráðgeving. Lógin áleggur eisini Kringvarpinum at ansa eftir, at tilfarið ikki skaðar likamligu, sálarligu og siðalagsligu menningina hjá børnum og ungum, og at tað ikki elvir til mannminkan, harðskap ella hatur orsakað av húðaliti, kyni, átrúnaði ella tjóðskapi. Í lógini stendur eisini, at Kringvarpið er tilbúgvingarstovnur, og at stovnurin eisini hevur ábyrgdina av miðlasavninum.

### 4.1 Krepputilbúgving

Sum ásett í kringvarpslógini hevur Kringvarp Føroya skyldu til at taka lut í almennari krepputilbúgving. Hetta merkir, at Kringvarp Føroya skal varpa boð, ið hava týdning fyri tilbúgvingina til Føroya fólk. Nógv dømi eru um týdningin av greiðum almennum samskifti í sambandi við neyðstøður. Kringvarp Føroya hevur havt aktivan leiklut í slíkum hendingum. Seinastu árini kunnu nevnast eldsbrunin á Varðanum Pelagic í 2017 og skriðulopini í Klaksvík í 2022. Eitt meira umfatandi dømi er koronukreppan, sum í Føroyum vardi frá mars 2020 til februar 2022, og har Kringvarpið var dúgliga nýtt í almenna tilbúgvingarsamskiftinum.

Kringvarpið hevur gjøgnum nógv ár tikið stig til at gera íløgur og at dagføra kritiskt undirstøðukervi, sum er altavgerandi fyri at kunna traðka til í eini neyðstøðu. Sum dømi kunnu nevnast neyðstreymsskipan, no break-skipan, servarar og dátugoymslur og útgerð til at senda sjónvarp og útvarp. Sum nakað nýtt hevur Kringvarpið tryggjað sær atgongd til fylgisveinasamband, um so er, at brek kemur á fipurkaðalar hjá NET.

**Málsetningur:** *Hóast Kringvarpið hevur ein eyðsýndan leiklut í tilbúgvingini, hevur leiðslan í Kringvarpinum kortini eftirlýst, at tilbúgvingarleikluturin hjá stovninum verður greiðari. Ætlanin er at gera eina greiða mannagongd saman við hinum pørtunum í tilbúgvingini um tilbúgvingarskyldurnar hjá Kringvarpi Føroya. Kringvarp Føroya fer síðani at dagføra tilbúgvingarmannagongdina innanhýsis í samsvari við avtalur við aðrar stovnar. Hetta arbeiðið verður gjørt í 2024.*

### 4.2 Miðlasavnið

Kringvarp Føroya hevur bygt upp eitt savn, ið er ein týðandi partur av mentanararvinum, og sambært lógini hevur stovnurin eisini skyldu at tryggja, at alt sent tilfar verður varðveitt og skrásett. Kringvarp Føroya skal halda savnið á einum tryggum og dagførdum stigi. Starvsfólk Kringvarpsins binda seg til at fylgja leiðbeiningunum á økinum. Verkætlanin Savnsgull hevur til endamáls at talgilda bandasavn Kringvarpsins og at gera tilfarið atkomuligt fyri fólkið.

Verkætlanin Savnsgull verður liðug í sáttmálaskeiðnum. Í miðlasavninum er ein ørgrynna av nýggjari og eldri tilfari, sum varpar ljós á okkara samtíðarsøgu. Í nógvum førum eru møguleikar fyri at fáa nýtt lív í eldri tilfar og at brúka savnstilfar á nýggjan hátt. Eisini skal vera lættari hjá fólki at leita og brúka tilfarið í miðlasavninum.

**Málsetningur:** *Ætlanin er, í sáttmálaskeiðnum, at lata miðlasavnið meira upp fyri fólki. Tað skal vera lættari at leita og brúka tilfarið fyri at økja um nyttuvirðið á miðlasavninum. Málið er, at sum mest av tí, ið er framleitt í Kringvarpi Føroya, Útvarpi Føroya og Sjónvarpi Føroya gjøgnum árini, verður atkomuligt á netinum, tó at fyrilit eisini má havast fyri upphavsrætti.*

# 5. Sáttmálaásettar public service-skyldur 2024-2028

Sambært § 11 í kringvarpslógini er heimilað landsstýrisfólkinum at skriva undir ein public service-sáttmála við Kringvarp Føroya eftir orðaskifti í Løgtinginum um ætlaða innihaldið. Sambært viðmerkingunum til lógaruppskotið eiga landsstýrisfólk og Løgtingið ikki at leggja seg út í programmábyrgdina hjá stjóranum ella redaktionella frælsið hjá Kringvarpi Føroya. Við øðrum orðum er armslongd millum Kringvarp Føroya øðrumegin og politisku skipanina hinumegin. Public service-sáttmálin er ein liður í at halda meginregluna um armslongd, tí sáttmálin ger tað møguligt hjá politisku skipanini á ein skipaðan hátt at ávirka karmarnar kring public service-virksemið, samstundis sum hon ikki blandar seg í redaktionellar avgerðir.

Public service-hugtakið er breitt, og tað ber ikki til at røkja allar hugsandi skyldur í senn. Tí eigur landsstýrismaðurin, sum umboð fyri Løgtingið og fólkið, at raðfesta og tryggja ávísar nærri allýstar public service-skyldur í einum tíðaravmarkaðum sáttmála.

Kringvarp Føroya eigur at røkja tær uppgávur, ið eru tilskilaðar í sáttmálanum, og skal hava fyrilit fyri fólkaræðisligum, samfelagsligum og mentanarligum viðurskiftum, sum viðkoma øllum fólki í Føroyum. Sum ovasta leiðsla fyri Kringvarp Føroya hevur stýrið eftirlit við, at skráin verður løgd til rættis sambært endamálunum, sum eru orðað í kringvarpslógini og public service-sáttmálanum. Í hesum liggur, at Kringvarpið er álítandi, dygdargott, fjølbroytt og óheft av seráhugamálum.

Niðanfyri eru skyldurnar hjá Kringvarpi Føroya í sáttmálaskeiðnum 2024-2028 nærri lýstar. Í nøkrum førum er talan um framhaldandi arbeiði á ávísum økjum, meðan í fleiri førum er talan um nýggjar málsetningar.

Kringvarp Føroya fer í sáttmálaskeiðnum at fremja niðanfyristandandi málsetningar.

### 5.1 Lýsa og greina føroyska mentan í breiðastu merking

Kringvarp Føroya skal framleiða tilfar, sum endurspeglar gerandisdagin og veruleikan hjá fólki í Føroyum í øllum sínum fjølbroytni, eitt nú innan átrúnað, livihátt, frítíð, arbeiðs- og familjulív.

**Sangur**: Kringvarp Føroya leggur seg í sáttmálaskeiðinum eftir at fremja felagssang og framleiða sendingar við felagssangi, sum er ein serliga sterkur mentanararvur hjá føroyingum.

**List**: Kringvarp Føroya skal endurspegla og viðgera føroyska list í øllum sínum fjølbroytni og listagreinum. Kringvarp Føroya fer í sáttmálaskeiðnum at framleiða sjónvarp um føroyska list.

**Drama**: Kringvarp Føroya skal virka fyri at menna og senda útvarps- og sjónvarpsdramatikk. Stovnurin skal eisini stuðla uppundir, at fólk verða eggjað til at skriva dramatikk til útvarp og sjónvarp. Kringvarp Føroya mennir samstarvið við filmsumhvørvið og aðrar avvarðandi partar um framleiðslu av sjónvarpsdramatikki.

**Bókmentir**: Kringvarp Føroya skal miða ímóti at viðgera og skifta orð um ymiskar bókmentir og miðla bæði føroyskar og útlendskar bókmentir.

**Undirhald:** Ein týðandi táttur í virkseminum hjá Kringvarpi Føroya er at senda undirhald fyri alla familjuna. Tað eigur at fevna breitt um skemt og speisemi, frítíð og ítriv og kappingar. Kringvarp Føroya leggur seg eftir at framleiða undirhaldssendingar, ið fanga og endurspegla heimliga speisemið og skemtingarlyndið, sum sprettir úr aktuellum ráki, og sum kann arga, flyta mørk og elva til kjak.

**Átrúnaður:** Kringvarp Føroya skal upplýsa, stimbra kjak og viðgerð av andaligum og átrúnaðarligum fyribrigdum og viðurskiftum, ið hava við tilveru okkara at gera. Kringvarpið leggur seg eftir at varpa beinleiðis gudstænastu í útvarpi hvønn sunnudag og í sjónvarpi hvønn sunnudag í vetrarskránni. Sjónvarpað verður somuleiðis regluliga frá møtum í samkomunum.

**Ítróttur:** Kringvarp Føroya skal við bæði beinleiðis og frammanundan framleiddum sendingum á fjølbroyttan hátt viðgera ymsu ítróttagreinarnar. Kringvarp Føroya skal leggja seg eftir at viðgera ítrótt úr forkunnugum sjónarhornum.

**Børn:** Kringvarp Føroya leggur stóran dent á at hava gott tilfar til børn og ung. Hetta er alneyðugt í eini tíð, har ein vaksandi nøgd av útlendskum tilfari er tøk hjá yngstu ættarliðunum. Kringvarp Føroya skal gera dygdargóðar sendingar til børn og ung á føroyskum máli. Í barnasendingunum skal Kringvarpið lata ein part av tilfarinum vera úr føroyskum jørðildi, soleiðis at børnini kenna seg aftur í einum føroyskum veruleika. Kringvarpið skal stuðla undir fyrireikingina til at taka ábyrgd sum sjálvstøðugt hugsandi og upplýstir borgarar í einum nútímans fólkaræði.

**Ung:** Størri dentur skal leggjast á tilfar til ungdómin, sum eggjar teimum ungu til at taka lut í samfelagsgongdini fólkaræðisliga. Somuleiðis skulu tey ungu menna seg til at kjakast um og taka støðu til viðurskifti, sum ávirka teirra gerandisdag. Ein partur av innihaldinum skal tí hava støði í gerandisdegnum hjá føroyskum ungdómi og innihaldi, sum tey kenna seg aftur í. Kringvarpið leggur seg í sáttmálaskeiðinum eftir at raðfesta hetta avriksøkið við at menna tilfar á teimum pallum, sum tey ungu brúka mest. Kringvarpið skal tryggja, at filmar, ið verða sýndir, eru flokkaðir samsvarandi lógini um miðlaráð til verju fyri børn og ung. Kringvarp Føroya skal tryggja, at sendingar ikki kunnu skaða likamligu, sálarligu og siðalagsligu menningina hjá børnum og ungum undir lógaldur, eitt nú við ónærisligum ella ógrundaðum, harðligum innihaldi.

**Tónleikur:** Føroyskur tónleikur hevur ein týðandi leiklut í Kringvarpi Føroya, eins og Kringvarp Føroya hevur stóran týdning fyri at fáa føroyskan tónleik út til lurtarar. Kringvarp Føroya skal miðla tónleik og skapa áhuga fyri føroyskum tónleiki. Kringvarp Føroya virkar sambært einum tónleikapolitikki, sum nú verður dagførdur, og sum hevur fyrilit fyri býtinum millum føroyskan og útlendskan tónleik, sum rúmar ymsum tónleikagreinum og nýggjum og eldri tónleiki. Kringvarpið skal samstarva við tónlistafólk, mentanarstovnar og onnur viðkomandi fyri at skapa høvi hjá tónleikarum at framføra og hjá føroyskum tónleikaverkum at verða framførd.

**Serføroysk viðurskifti:** Kringvarp Føroya skal, umframt omanfyrinevnda, eisini syrgja fyri at upplýsa um serføroysk viðurskifti, eitt nú føroyskan dans, føroyskt handverk og føroyskt djóra- og plantulív og veðurlag.

### 5.2 Miðla aktuelt tilfar á høgum journalistfakligum stigi

Tíðindaflutningurin í Kringvarpi Føroya skal vera óheftur av politisku skipanini og seráhugamálum og eigur at vera merktur av eini framleiðslu, sum fyrst og fremst leggur seg eftir at finna út av, hvat vendir upp og niður og síðani at veita fólkinum neyvar og álítandi upplýsingar um týdningarmikil samfelagslig viðurskifti.

Tíðindadeildin í Kringvarpinum hevur serliga eyguni eftir føroyska samfelagnum, men skal eisini, tá ið hetta er viðkomandi, verða ein gluggi út í heim. Týdningarmiklar hendingar ella rembingar av ymiskum slag í øðrum londum skulu eisini varpast á føroyskum máli. Um tað er viðkomandi, eiga hesar frásagnir eisini at hava eitt føroyskt sjónarhorn.

Á deildini Aktuelt skulu í minsta lagi vera tvær tíðindaredaktiónir, sum hava hvør sín redaktør, ið hevur ábyrgd av tíðindadegnum og leiðir redaktiónina.

Tíðindi í Kringvarpi Føroya skulu vera álítandi, óheft og kritisk. Fyri at røkka hesum arbeiðir Kringvarpið eftir kritisku journalistisku meginregluni. Hetta merkir, at øll, sum framleiða innihald fyri Kringvarp Føroya:

- hava vitan um evnið
- fylgja alment galdandi reglum um gegni
- velja viðkomandi keldur og eftirkanna teirra útsagnir
- eru keldukritisk og tilvitað, um talan er um serfrøðingar, partskeldur ella onnur sløg av keldum
- skilja millum frágreiðandi og litaðar útleggingar av einum evni
- eru ágrýtin eftir svari upp á viðkomandi spurningar
- lýsa og greina viðkomandi sjónarhorn

Tíðindadeildin skal ikki bara reagera upp á hendingar í samfelagnum, men skal eisini vera proaktiv. Framleiðslan á deildini skal seta dagsskránna og stimbra almenna kjakið. Redaktørar og journalistar hava skyldu at áhaldandi fylgja við málum, sum hava stóran almennan týdning, og at taka hesi upp, tá ið tað er viðkomandi.

### 5.3 Førleikamenna starvsfólk

Kringvarp Føroya skal stremba eftir at skapa eitt mennandi og áhugavert arbeiðsumhvørvi, har faklig dygd hevur fremstu raðfesting í dagliga arbeiðinum. Kringvarp Føroya skal stimbra menningina av føroyskum journalistikki og fakligum førleikum annars.

**Málsetningur:** *Kringvarpið fer í sáttmálaskeiðnum at skipa fyri málrættaðum førleikaætlanum fyri hvørt einstakt starvsfólk, soleiðis at tey á besta hátt eru før fyri at lyfta uppgávurnar í public service-sáttmálanum.*

### 5.4 Menna føroyska málið og samleika føroyinga

Málið er grundleggjandi samfelags- og mentanarberi og er grundleggjandi fyri samleikan hjá øllum menniskjum. Føroyska málið er tó undir vaksandi trýsti. Ung sum eldri brúka nógv altjóða stroymingartænastur og miðlapallar, har føroyskt mál so at siga ikki er til. Tí hevur tað so avgerandi týdning, at Kringvarpið røkir føroyska málið væl. Stovnurin skal virka fyri at menna føroyska málið, soleiðis at rætt og lætt skilligt mál er í øllum sendingum.

**Málsetningur:** *Kringvarpið hevur ein málpolitikk í dag, men fer í størri mun – og sum liður í eini førleikaætlan – at skipa fyri málmenning innanhýsis á stovninum, har tørvur er á hesum. Havandi í huga stóru mentanarligu ávirkanina uttanífrá, fer Kringvarpið í sáttmálaskeiðnum at vaksa um nøgdina av føroyskum tilfari í sjónvarpinum. Kringvarpið fer eisini at vaksa um nøgdina av týddum og tekstaðum tilfari, bæði til børn, ung og vaksin.*

### 5.5 Bjóða dygdargóðar talgildar tænastur

Kringvarp Føroya ásannar, at miðlavanarnir broytast, og at framtíðin er netborin og talgild. Kringvarp Føroya skal røkka brúkaranum, har hann er. Tí gagnnýtir Kringvarpið alnetið til innihald og tænastur, ið samsvara við public service-skyldurnar. Heimasíðan hjá Kringvarpi Føroya skal áhaldandi mennast sum samskiftis- og tænastumiðil, soleiðis at hon kennist viðkomandi og týdningarmikil fyri fólk í øllum aldri. Heimasíðan fevnir um tíðindi og aktuelt, mentan, tilfar til børn og ung, undirvísing og annað viðkomandi. Heimasíðan røkkur sum miðil bæði fólki í Føroyum og uttanlands.

Allar egnar sendingar skulu leggjast á alnetið. Kringvarpið stroymir javnan sendingar beinleiðis. Kringvarp Føroya samskipar talgilt føroyskt tilfar til børn og ung, so at tað verður lætt atkomuligt.

**Málsetningur:** *Kringvarpið fer at virka fyri, at heimasíðan kvf.fo og aðrir talgildir pallar hjá Kringvarpinum verða fremstu tíðinda- og samskiftispallar hjá fólki í Føroyum.*

### 5.6 Fevna breitt og víðka sjónarringin

Kringvarp Føroya skal stimbra áhuga fólksins at ogna sær breiða almenna vitan gjøgnum atkomuligt og fólksligt tilfar. Tænastan skal taka støði í samfelagnum og skal endurspegla margfeldi, mentan, ymiskar lívsáskoðanir, føroyska siðalæru og livihættir. Kringvarpið skal varpa úr økjum, har søgur spretta, og skal, so nógv sum til ber, vera á staðnum, tá ið týdningarmiklar hendingar fara fram.

**Málsetningur:** *Kringvarp Føroya fer í sáttmálaskeiðnum at framleiða meiri siðmennandi tilfar.*

### 5.7 Eggja til javnstøðu millum kynini

Redaktionellar avgerðir og sendingar í Kringvarpinum skulu leggja upp fyri javnstøðu. Kringvarpið skal leggja seg eftir, at bæði kyn eru væl umboðað í sendingum, har hetta er viðkomandi, og at bæði kyn eru væl umboðað, tá talan er um eitt nú vertir, keldur og aðrar luttakarar.

**Málsetningur:** *Kringvarpið orðar ein politikk á økinum, sum verður klárur í 2024.*

### 5.8 Eggja til fólkaræðisligt tilvit

Sum almennur tíðindamiðil eigur Kringvarpið at leggja dent á opinleika og gjøgnumskygni og at skipa fyri upplýsing um public service og fólkaræði í breiðum týdningi. Kringvarp Føroya virkar í fólksins tænastu, og tí skal Kringvarp Føroya virka fyri støðugum samskifti við fólkið um alt landið. Kringvarp Føroya skal tryggja, at regluligt orðaskifti verður um public service, innihald, endamál og miðlapolitikk. Talan kann vera um fundir, ráðstevnur og almennar frágreiðingar um einstøku partarnar av public service-arbeiðnum.

**Málsetningur:** *Kringvarpið fer í sáttmálaskeiðnum at eggja til meira kjak um miðlar, fólkarøði, journalistikk og public service.*

### 5.9 Viðgera viðurskifti í øllum Føroyum

Savningarmegin hevur alstóran týdning fyri fólkarøðið. Nú stóru stroymingartænasturnar gera kappingina um miðlanýtsluna alsamt harðari, er tað av stórum týdningi, at Kringvarp Føroya varpar ljós á og speglar vinnu- og mentanarlív og samfelagsviðurskifti kring alt landið.

**Málsetningur:** *Kringvarpið fer framhaldandi at leggja dent á at senda tíðindi úr øllum landinum og við jøvnum millumbili at senda úr ymsu økjunum í Føroyum.*

### 5.10 Samstarva um og keypa framleiðslur

Hóast Kringvarpið hevur evstu ábyrgd av tí, sum sent verður, eigur Kringvarpið at hava eitt opið og skipað samstarv við framleiðslueindir uttan fyri stovnin, bæði feløg, onnur kringvørp, portalar og einstaklingar. Stovnurin heldur tí fram at bjóða ávísar framleiðslur út og keypa lidnar framleiðslur og konsept. Hesar skulu lúka somu krøv um dygd og innihald sum sendingar Kringvarpsins annars. Kringvarpið heldur fram at veita fríyrkisfólkum eitt undirstøðukervi, soleiðis at tey kunnu bjóða seg fram og menna sín serkunnleika. Á henda hátt tryggjar Kringvarpið størri sendifjølbroytni. Harafturat samstarvar Kringvarpið við aðrar aktørar um framleiðslur og stroyming av eitt nú mentanartiltøkum, ítróttatiltøkum, átrúnaðarligum tiltøkum og útbúgvingarligum tiltøkum.

**Málsetningur:** *Kringvarpið miðar ímóti at útveita 25 % av útvarpsskránni og somuleiðis ein vaksandi part av sjónvarpsskránni. Kringvarpið ger árliga upp, hvussu nógv av framleiðsluni er útveitt. Skipanin við fríyrkisfólkum skal eftirmetast og mennast. Kringvarpið skal framhaldandi tryggja, at tilfarið, sum fríyrkisfólk framleiða og senda, er væl úr hondum greitt.*

### 5.11 Miðla til undirvísing

Kringvarp Føroya skal senda og endurvarpa sendingar, sum hava varandi undirvísingar- og upplýsingarvirði, eitt nú sendingar um mál, list, søgu, umhvørvi og mentan.

**Málsetningur:** *Kringvarp Føroya heldur fram við at menna samstarvið við viðkomandi undirvísingar- og mentanarstovnar í sambandi við innihald, framleiðslu og kunning um undirvísingartilfar.*

### 5.12 Miðla til fólk, ið bera brek

Kringvarpið hevur í sáttmálaskeiðinum regluligt samskifti við MEGD um, hvussu tænasturnar til tey, sum bera brek, kunnu mennast. Public service-tænastur til deyv og hoyriveik skulu styrkjast og mennast í sáttmálaskeiðnum. Kringvarp Føroya hevur samstarv við viðkomandi partar, soleiðis at tíðindi og sendingar, ið hava stóran samfelagsáhuga, verða teknmálstulkaðar. Tíðindasendingarnar í sjónvarpinum verða tekstaðar. Gudstænastur í sjónvarpinum verða tekstaðar. Sendingar, ið hava stóran samfelagsáhuga og -týdning, eitt nú valsendingar og viðkomandi dokumentarsendingar, eiga at verða tekstaðar skjótast gjørligt. Kringvarpið sendir beinleiðis tekstfrásøgn frá tíðindafundum, sum snúgva seg um tilbúgving.

**Málsetningur:** *Miðað verður ímóti í størri mun at veita einfaldar nettænastur til fólk við sjón- ella hoyribreki.*

### 5.13 Miðla til tilflytarar

Ein vaksandi partur av fólki í Føroyum skilir ikki føroyskt mál. Samstundis hevur tilfarið, sum Kringvarpið framleiðir, týdning fyri hendan partin av Føroya fólki.

**Málsetningur:** *Kringvarp Føroya skal gera public service-tilfar atkomuligt fyri tilflytarar, ið ikki skilja føroyskt ella skandinaviskt mál.*

# 6. Fígging

Virksemið hjá Kringvarpi Føroya verður sambært kringvarpslógini (Ll. nr. 61 frá 16. mai 2006, sum seinast broytt við Ll. nr. 163 frá 24. desember 2015) fíggjað við kringvarpsgjaldi, kunngerðarinntøkum, sponsorering og øðrum virksemi, sum er knýtt at uppgávum stovnsins. Harumframt hevur Kringvarp Føroya loyvi at skipa fyri inntøkugevandi eydnuspølum.

### 6.1 Kringvarpsgjald, kunngerðar- og sponsorinntøkur

Inntøkurnar hjá Kringvarpinum koma í høvuðsheitinum frá kringvarpsgjaldinum. Útvarpskunngerðir eru fækkaðar í tali, helst í sambandi við at netmiðlar hava vunnið fram, men kunngerðarinntøkurnar tykjast nú kortini at hava fingið eina støðuga legu. Árligu inntøkurnar frá kunngerðum eru umleið 2,5 mió. kr., sum svara til umleið 3–4 % av samlaðu inntøkunum.

Tað er loyvt Kringvarpi Føroya at hava sponsorinntøkur í ávísum førum. Talan skal vera um serstøk tiltøk, sum verða samskipað við aðrar aktørar, tað veri seg stór og avgerandi ítróttatiltøk, tónleikaella onnur umfatandi mentanartiltøk. Ískoytisveitingar verða eisini brúktar til at útvega serlig sjónvarpsrættindi til Kringvarpið.

### 6.2 Støðlaðar spæliinntøkur

Fíggjarmálaráðið og Gjaldstovan hava mett, at spæliinntøkurnar hjá Kringvarpi Føroya kunnu sammetast við fremmanda fígging sambært §13, stk. 6 í roknskaparkunngerðini:

“Inntøkur av verkætlanum o. t. – sum rætturin til at taka ímóti, er treytaður av, at ávíst virksemi verður framt – verða tiknar við sum inntøka, so hvørt sum peningurin verður nýttur til ætlaða endamálið.”

Skipanin við fremmandu fíggingini av spæliinntøkum hjá Kringvarpi Føroya virkar á tann hátt, at tað, sum er eftir at fíggja, verður fíggjað við fremmandu fíggingini, um upphædd er á kontuni, sum verður tikin við á fíggjarstøðuni undir skuld. Uppsparda upphæddin til fremmanda fígging kann verða samansavnað eftir einum ella fleiri árum og kann nýtast eftir einum ella fleiri árum. Fremmanda fíggingin er tískil ein restfígging, sum er treytað av tveimum viðurskiftum:

- at fígging vantar í til raksturin av Kringvarpinum, tá ið ársins kringvarpsgjald, aðrar inntøkur og møgulig játtan eru nýttar. Í hesum liggur eisini, at vanligu inntøkurnar og játtan ikki kunnu samansavnast á kontu fyri fremmandari fígging á fíggjarstøðuni.

- at spæliinntøkur eru tøkar á fíggjarstøðuni, tað vil siga, at tað er ein uppspard upphædd á fíggjarstøðuni til fremmanda fígging. Kringvarpið má tí taka við, hvussu stórar samansavnaðu tøku spæliinntøkurnar eru og væntandi verða, tá ið fleirársætlanir fyri virksemið verða lagdar. Tað kann ongantíð verða flutt meira til raksturin av kontu fyri fremmandari fígging enn upphæddin á kontuni, tað vil siga, at kontan fyri fremmanda fígging ongantíð kann koma í trot.

Tað hevur stóran týdning, at spæliinntøkurnar verða støðlaðar og brúktar sum restfígging av tilrættislagda virkseminum. Stýri og leiðsla hava á henda hátt møguleika at leggja virksemi og íløgur væl til rættis, so at pengar verða brúktir á skilabesta hátt. Kringvarpið hevur eitt nú seinnu árini sjálvt fíggjað neyðugar íløgur til tøkni og stóra neyðstreymsútbúnaðin, sum er neyðugur, tí Kringvarpið er partur av landsins tilbúgving. Somuleiðis hevur Kringvarpið partvís fíggjað útreiðslur, ið standast av viðlíkahaldi og bygningum.

Eisini er møguligt hjá Kringvarpinum at standa ímóti, um aðrar inntøkur brádliga svíkja, t.d. um fólkatalið brádliga minkar, sum hevur við sær týðandi ávirkan á inntøkurnar frá kringvarpsgjaldi.

### 6.3 Rakstrarkostnaður seinnu árini

Kostnaðurin av at reka Kringvarp Føroya kann býtast í beinleiðis útreiðslur til framleiðslu og óbeinleiðis útreiðslur. Beinleiðis útreiðslur er kostnaðurin at reka deildirnar Aktuelt, Mentan og ein part av deildini Tøkni. Óbeinleiðis útreiðslur á stovninum er kostnaðurin av at reka umsiting, ein part av Tøkni-deildini umframt felagsútreiðslur sum íløgur, avskrivingar, fíggjarligar útreiðslur o.a. Víst verður til grannskoðaða roknskapin hjá Kringvarpinum undanfarnu árini.

# 7. Ársfrágreiðing um virksemið

Fyri at røkka øllum málum í sáttmálanum skal Kringvarp Føroya útbyggja hagtalsgrundarlagið, sum kann brúkast í eftirmetingini av virkseminum. Eisini skulu brúkaratøl, nøgdsemiskanningar og góðskumeting vera partur av árligu frágreiðingini.

Stjórin í Kringvarpi Føroya skal á hvørjum ári fyri 1. apríl skriva eina frágreiðing, ið vísir í hvønn mun public service-skyldurnar ásettar í hesum sáttmála eru hildnar undanfarna árið. Frágreiðingin skal í høvuðsheitum fylgja uppsetingini í hesum sáttmála. Eru ásetingarnar ikki hildnar, skal stjórin greiða frá orsøkini og vísa á, hvussu ætlanin er at halda public service-skyldurnar restina av sáttmálaskeiðinum.

Frágreiðingin verður latin stýrinum fyri Kringvarp Føroya, ið hevur eftirlit við, at public service-sáttmálin verður hildin.

Eftir at frágreiðingin er viðgjørd, letur stýrið í seinasta lagi 1. mai landsstýrisfólkinum í mentamálum frágreiðingina saman við viðmerkingum og fráboðanum um, hvørji tiltøk ætlanin er at seta í verk, um so er, at sáttmálin á týðandi økjum ikki er hildin.

Við støði í frágreiðingunum kunnu partarnir eftirmeta sáttmálan og gera neyðug ískoyti, tá ið sáttmálaskeiðið er av.

Tórshavn, 30. mai 2024

Rógvi Olavson, stýrisformaður

Sirið Stenberg, landsstýriskvinna

Ivan Niclasen, stjóri í Kringvarpi Føroya

Eyðun Mohr Hansen, aðalstjóri

KRINGVARP
FØROYA